**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fyrstilærari í Leirvíkar skúla

**Starvið sum fyrstilærari í Leirvíkar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2003.**
**Skúlaárið 2003/2004 verða 93 næmingar í 7 árgangum í skúlanum. 8 lærarar starvast í skúlanum.**

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Eysturoyar skúladømi I við fyribils tænastu í Leirvíkar skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni *www.mmr.fo*, skal vera Mentamálaráðnum **í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. apríl 2003.**

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

17. mars 2003
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið viðv. havnaútbygging í Nólsoy, vegna Nólsoyar Kommunu, boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið fevnir í stuttum um gerð av einum uml. 80 m langum brimgarði.

Høvuðsnøgdirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Útlegging og flutningur av gróti | 42.000 $m^3$ |
| Spreingiarbeiði | 28.000 $m^3$ |
| Upptøku av verjugróti á gamla molanum | 4.000 $m^3$ |
| Flyting av verandi betongkistu, uml. 80 m | 1 stk. |

Lisitasjónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, hósdagin 1. mai 2003 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 2. apríl 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 10.000, ið verður at flyta á konto nr. 128.220.6 í Føroya Sparikassa ella konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitasjónina.

Adressa:
**Landsverkfrøðingurin,**
Tinghúsvegur 5 · Postboks 78 · 110 Tórshavn,
Telefon 311333 · Telefax 314986
Teldupostur: eli@lv.fo

**Landsverkfrøðingurin**

# Lýsing eftir fosturfamilju í Klaksvík

Barnaverndin hjá Klaksvíkar Kommunu søkir við hesum eftir einari fosturfamilju í Klaksvík, ið hevur hug og umstøður at gerast fosturfamilja hjá einari 11 ára gamlari gentu frá mai mánað 2003.

Málið við fosturfamiljuni er, at menna gentuna og styrkja hennara netverk.

Tað er ein fyritreyt at fosturfamiljan er sinnað at virka í tøttum samstarvi við biologisku familjuna.

Arbeiðið verður skipað í samráð við familjuna og barnaverndina.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært galdandi reglum.

Áhugaðar familjur kunnu venda sær til Tonju Ziskason á telefon 410000.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. apríl 2003 og skulu stílast til:

**Klaksvíkar Kommunu**
Barnaverndarnevndin
Postboks 2
FO-700 Klaksvík


Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Útleiguamboð**
**Skal tú brúka amboð í styttri tíð?**
**Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**

**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!



Sosialurin 311820


# Tvøroyrar Býráð

Uppskot til nýggjan býarplan og byggisamtykt er gjørd fyri Tvøroyrar Kommunu.

Uppskotið liggur frammi á býráðsskrivstovuni til alment eftirlit frá 01. apríl 2003 til 28. apríl 2003.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot skulu vera Tvøroyrar Býráð í hendi áðrenn 01. juli 2003.

**Tvøroyrar Býráð**


Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg





